# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 19-01-2024 |
| Mál nr.: | 24/01720 |
| Málsviðgjørt: | HW |
| Ummælistíð: | Frá 19. januar til 5. februar |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan (fólkaskúlalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 20 verður sett:

Er næmingatalið í flokkinum hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, kann skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2023 varð álit handað landsstýrismanninum um broytingar í fólkaskúlalógini, umframt at úrslit frá einari trivnaðarkanning vóru almannakunngjørd.

Í álitinum framgongur m.a., hvussu stóran týdning tað hevur, at vit hava eina skipan, sum tekur nøktandi atlit til støddina á tí einstaka flokkinum, soleiðis at henda sampakkar við nøktandi tíð til tann einstaka næmingin. Mælt verður m.a. til í álitinum, at næmingatalið ikki fer uppum 20 næmingar.

Trivnaðarkanningin sum var almannakunngjørd vísti tíverri, at trivnaðurin millum børnini í føroyska fólkaskúlanum ikki er vorðin betri, men heldur hevur gongdin verið hinvegin, t.e. at trivnaðurin er versnaður. Hvat trivnað viðvíkur, eru tað óivað nógvir faktorar sum spæla inn, men tó má ásannast, at nøktandi tíð frá tí vaksna til tann einstaka næmingin eisini kann viðvirka til betran av trivnaðinum.

Við at seta inn og geva møguleika fyri at minka um floksstøddina, verður fyrsta stig tikið til at tryggja tí einstaka næminginum betri úrtøku frá tíðini í fólkaskúlanum, og væntandi kemur hetta átak eisini at betra um trivnaðin hjá børnunum.

Ætlanin er eisini í komandi ári at gera aðrar broytingar, sum kunnu stuðla upp undir betur trivnað hjá bæði børnum og teim vaksnu, sum hava sítt yrki innan skúlagátt, umframt at betra úrtøkuna hjá tí einstaka næminginum. Hetta væntast at vera gjørt við eitt nú at hyggja nærri at flokslæraraskipanini, og møguleikanum fyri at víðka um núverandi.

Við støði í omanfyristandandi snýr fyriliggjandi broyting seg einans um minkan av floksstøddini niður á 20 næmingar, men er hetta sostatt bert fyrsta stig á leiðini móti einum enn betri fólkaskúla.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu stendur, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Henda orðing er heldur ógreið, og í praksis hevur hetta merkt, at

flokkar eru og hava verið við upp til 26 næmingum, tí í galdandi játtanarskipan verður játtað tímar til tveir flokkar við næmingi nr. 27.
Nógv eru samd um, at tað er ov nógv við upp til 26 næmingum í hvørjum flokki, har tað er trupult hjá læraranum at røkka øllum 26 næmingunum.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Høvuðsendamálið er, at meira læraratíð verður til hvønn einstakan næming. Tískil skal tað verða møguligt hjá hvørjum einstøkum skúla at býta upp í tveir flokkar við næmingi nr. 21.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Í galdandi lóg stendur í § 20: "*Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum*". Hetta broytingaruppskot inniber eina nýskipan, har einstaki skúlin fær rætt til at býta upp í tveir flokkar við næmingi nr. 21. Tað er einstaki skúlin, sum sjálvur hevur ræði til at gera av, um floksbýtið verður gjørt við 21. næminginum, ella um sett verður inn við øðrum fyriskipanum, harundir t.d. við tvílæraraskipan. Sostatt verður tað 21. næmingurin, ið útloysir játtan til nýggjan flokk, og kostnaðurin fyri hetta verður árliga umleið 4 mió. kr.
Henda skipan verður galdandi frá skúlaárinum 2025/2026. Tá verður byrjað við 1. flokki, og skipanin verður síðan rullað út yvir 9 ár og soleiðis sett í gildi eftir nýggju árum við einum samlaðum kostnaði á umleið 36 mió. kr. yvir nýggju fylgjandi ár. Sostatt verður henda nýggja skipan við 20 næmingum í flokkunum sett í verk í stigum, soleiðis at tað ganga níggju ár til fult flokkabýtið verður gjøgnumført.

Henda broyting verður gjørd stigvíst grundað á, at kommunurnar og onnur skulu hava tíð til at tillaga hølisligu umstøðurnar í einstøku skúlunum. Sambært álitinum eru tað í verandi skipan, við í mesta lagi 26 næmingum í hvørjum flokki, í alt 245 flokkar. Tá tað framyvir skulu kunna verða í mesta lagi 20 næmingar í hvørjum flokki frá 1.-9. flokk, so økist flokkatalið við 75 flokkum. Hetta økta flokkatalið er ein vegleiðing hjá kommununum at meta seg eftir í sambandi við hølisviðurskiftini í skúlunum, bæði tá ið talan er um verandi skúlabygningar og nýggja skúlabygging, umframt í sambandi við um- og uppíbygging í verandi skúlum.
Arbeiðsbólkur hevur handað álit um broytingar í fólkaskúlalógini, har eitt av tilmælunum er, at floksstøddin við skúlaársbyrjan eigur at verður 20 næmingar. Tískil má tímajáttanin

broytast soleiðis at játtað verður til tveir flokkar, tá ið næmingatalið við skúlaársbyrjan er hægri enn 20 næmingar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Føroya skúlaleiðarafelag, Føroya Pedagogfelag Føroya Kommunufelag, Gigni. Megd, og Felagið Heim og skúli, umframt aðalráðini.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Fyri landið kemur hetta at kosta umleið 4 mió. kr. um árið frá 2025 og tey fylgjandi nýggju árini, tvs. tilsamans umleið 36 mió. kr.

Fyri kommunurnar verða fíggjarligu avleiðingarnar av hesum uppskoti treytaðar av, hvørjar umbyggingar, útbyggingar og nýbyggingar hvør einstøk kommuna má seta í verk, til tess at útvega nøktandi hølisumstøður til at hava nokk av floksstovum til flokkar við 20 næmingum. Verður tað býtt í tveir flokkar í øllum núverandi flokkum við fleiri enn 20 næmingum, so økist flokkatalið við 75 flokkum yvir tey komandi nýggju árini.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Tað verða ikki nógvar og umfatandi umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur við sær størri avleiðingar fyri størru kommunurnar við høgum barnatalið og tessvegna høgum næmingatalið, tí í hesum kommunum verða fleiri flokkar við fleiri enn 20 næmingum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Markaforðingar**

Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1, nr. 1

Í galdandi fólkaskúlalóg stendur í § 20, at: "*Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum*". Henda grein er heldur óneyvt orðað, tí hvat skal leggjast í orðið "vanliga", tvs. hvussu skal tað tulkast, at næmingatalið vanliga ikki eigur at fara upp um 24 í hvørjum flokki. Í praksis hava vit í veruleikanum havt flokkar við bæði 25 og 26 næmingum. Føroya Lærarafelag hevur verið úti alment og funnist at hesum viðurskiftum, at tað í fleiri flokkum hava verið floksstøddir við eitt nú 25 og 26 næmingum.

Tað kann jú koma fyri, at flokkar sum við skúlaársbyrjan hava 24 næmingar í flokkinum, seinni í skúlaárinum fáa nýggjar næmingar í leggjast afturat næmingatalinum í flokkinum, tí tað hendir jú av og á gjøgnum eitt skúlaár, at næmingar flyta skúla ella av einhvørjari orsøk vilja flyta í annan flokk.

Í álitinum um broytingar í fólkaskúlalógini er eitt av tilmælinum um floksstødd, har mælt verður til eina floksstødd á í mesta lagi 20 næmingar í hvørjum flokki. Í álitinum verður víst á, at henda floksstødd við 20 næmingum í hvørjum flokki sambært námsfrøðiligari gransking á økinum, er ein væl hóskandi fortreyt fyri námsfrøðiligari, trivnaðarligari og fakligari menning.

Ein fortreyt fyri at skapa trivnað og tær góðu relatiónirnar í flokkinum er, at lærarin hevur nøktandi tíð til einstaka næmingin. Hetta er galdandi fyri allar næmingar, at teir kenna seg bæði verða sæddar og hoyrdir av læraranum. Tað er umráðandi, at fyriskipanirnar í fólkaskúlanum taka hædd fyri hesum, so at næmingarnir uppliva, at undirvísingin bæði er áhugaverd og viðkomandi, og at tað í skúlanum er gott at vera, har atlit verða tikin at førleikum, tørvi og evnum hjá tí einstaka næminginum.

Tað er ein fortreyt fyri at náa tí einstaka næminginum, at vit í fólkaskúlanum menna læring og felagsskapin í flokkinum, at flokkarnir ikki eru ov stórir, og at lærarin hevur nøktandi tíð til hvønn einstakan næming. Sjálvt um flokkar eru ymiskir, so kann tað eisini í teimum vælvirkandi flokkunum vera torført hjá einum lærara við 24-26 næmingum at náa øllum næmingunum, ikki bara fakliga, men eisini við atliti at trivnaði og felagsskapi, tí ov lítil tíð er til hvønn einstakan. Hetta eru viðurskifti, sum eiga at verða bøtt um, so skjótt sum til ber við

møguleika fyri antin at lækka floksstøddina ella seta aðra fyriskipan í verk, sum kann tryggja meira tíð til einstaka næmingin.
Broytingaruppskotið gevur heimild til skúlaleiðaran at velja ímillum antin at býta flokkin upp við 21. næmingin, ella seta inn við aðrari skipan, t.d. tvílæraraskipan, sum skal tryggja nøktandi undirvísingartíð til tann einstaka næmingin.

Viðmerkjast skal, at tað neyðturviliga ikki skal vera talan um tvílæraraskipan, men at tað eisini kann hugsast, at skúlaleiðarin velur at seta inn á annan hátt, eitt nú við at seta ein námsfrøðing inn.
Orsøkin til, at frælsi verður givið skúlaleiðaranum í samráð við lærarar skúlans, til at velja ímillum at býta flokkin upp ella seta aðra fyriskipan í verk, skal síggjast í ljósinum av, at tað tá ikki altíð er mest skynsamt at býta flokkin upp. Tá tað t.d. er talan um ein vælvirkandi flokk við 21-22 næmingum, tá kann tað í ávísum førum verða ein betri háttur at tryggja nøktandi tíð til tann einstaka næmingin, t.d. við tvílæraraskipan ella við at gera brúka av námsfrøðiligum stuðli inni í flokkinum.

Í galdandi játtanarskipan verður játtað til tveir flokkar við 27'inda næminginum. Broytingaruppskotið viðførir, at henda skipan verður broytt soleiðis, at játtast skulu tímar til tveir flokkar, tá næmingatalið við skúlaársbyrjan er meir enn 20, og tekur skúlaleiðarin so avgerð um, hvussu henda tímajáttan verður brúkt. Við hesum verður tryggjað meira lærartíð til einstaka næmingin og til at skapa góðar relatiónir millum tann vaksna og næmingin, sum er av alstórum týdningi fyri læring og trivnað hjá næminginum, og harvið eisini hjá flokkinum.

Viðmerkjast skal tó, at mett verður at nýtt floksskifti og floksbýtið eigur at verða gjørt við størsta fyrivarni, serliga tá næmingarnir hava funnið sítt tilhaldsstað, sínar vinir og floksfelagar í sínum samansjóðaða flokki. Hetta grundað á at fleiri atlit mugu takast, nógv viðurskifti og nógvir faktorar kunnu gera seg galdandi, tá avger skal takast um floksskipan og floksbýtið í einstaka skúlanum. Taka vit eitt dømi um ein flokk, har næmingatalið við skúlaársbyrjan vísir seg at verða 21 næmingar, tá er tað ikki altíð neyðturviliga rættast at býta næmingarnar upp í tveir flokkar á 10 og 11 næmingar, tí tá kunnu flokkarnir møguliga gerast ov smáir við ov lítlum dynamikki, har næmingarnir møguliga hava færri møguleikar til at finna vinir og til at luttaka í ymiskum bólkum inni í flokkinum.

Omanfyristandandi nýskipan verður gjørd stigvíst yvir nýggju ár, soleiðis at kommunur og onnur fáa tíð til at tillagað umstøðurnar til hesa nýskipan. Byrjað verður í skúlaárinum 2025-2026 við 1. flokki, og so stigvíst í hinum floksstigunum yvir tey eftirfylgjandi skúlaárini yvir tilsamans nýggju ár.

Broytingin  kemur at viðføra ein kostnað á umleið 4 mió. kr. árliga yvir nýggju ár, tvs, í alt umleið 36 mió. kr.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 19-01-2024

**Djóni Nolsøe Joensen**

landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen